## DAGSINS MEINING

# Bankin friðast

Løgtingsmaðurin Henrik Old, ið er formaður í løgtingsins vinnunevnd, hevur her í blaðnum mælt til at friða Føroya Banka fyri øllum fiskiskapi í eitt ella tvey ár. Bakgrundin fyri hesum hugskoti tingmansins er, at tað nú vísir seg, sum nógv minni er at fáa, enn tað hevur verið. Eisini sæst, at fyri tveimum árum síðani var meginparturin av veiðini stórur toskur. Nú er bert helvtin av veidda toskinum stórur toskur. Sum kunnugt er Føroya Banki kendur fyri sín stóra tosk – banktoskarnir eru tiltiknir. Tað má tí takast sum eitt álvarsamt vandasignal, at mongdin av stórum toski í veiðuni er minkað so nógv. Mint verður eisini á, at fiskidaganevndin hevur mælt til at minka um fiskidagatalið Bankanum.

Eina meginorsøk til hesa skeivu gongd á Føroya Banka sigur Henrik Old vera handilskvoturnar. Teir stóru línubátarnar hava keypt fiskidagar frá smærri bátum og á hendan hátt verður verður veiðitrýstið størri enn ætlað frá almennari síðu. Hetta tí ofta er talan um fiskidagar, sum annars ikki høvdu verið brúktir á Bankanum. Við tí skili, sum nú er galdandi, er veiðitrýstið økt út við 100 prosent, og hetta trýst kann Bankin heilt einfalt ikki tola. Tað er tí avgerandi neyðugt við politiskum tiltøkum heilt skjótt. Formaðurin í vinnunevndini sigur seg hava varhugan av, at almenna fyrisitingin ikki heilt skilir álvaran í hesum máli og hann væntar ikki, at tað verður eitt lætt mál at loysa.

Fiskiríkidømið í føroyskum sjóøki er ogn Føroya fólks. Landsins politikarar hava skyldu at umsita hetta tilfeingi við ábyrgd og skili. Tað kann ikki góðtakast, at ein so týðandi partur av okkara tilfeingi, sum toskurin á Føroya Banka verður niðurfiskaður. Er skaðin fyrst hendur, fer tað at ganga long tíð, áðrenn hann verður bøttur aftur. Tað er tí at vóna, at allar avvarandi partar kenna sína ábyrgd og duga at síggja álvaran í hesum máli. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eigur at taka hetta álvarsmál upp sum skjótast. Tað verður einki lætt mál, men tað eigur ikki at ræða ein ungan og dugnaligan fiskimálaráðharra.

**Sosialurin**

# Gevið Sandoynni eina ítróttarhøll

**Listaskúli, Ítróttarskúli, Tónleikaskúli. Mong hava nøvnini verið á verkætlanunum hjá Páll á Reynatúgvu, fyri at fáa onkran bygning á Sandoynni fyri almennar pengar sum varða av sær sjálvum. Veruligi tørvurin tykist at vera ein ítróttarhøll. Og hesa hevur Menta-málaráðið longu givið sandoyggjafólki eina tilsøgn um at rinda ein part av.**



**John Johannessen**
*tinglimur Javnaðarfloksins mentanarnevndin*

Tjóðveldistingmaðurin, Páll á Reynatúgvu, vil ikki vera við til at bjarga Musikskúlanum. Orsøkin er, at landsstýrismaðurin í mentamálum vil hava fíggjarnevndina at góðtaka, at 450 túsund krónur verða fluttar musikskúlanum av játtanini uppá 500 túsund til Listaskúla á Sandoynni.

Veruleikin er, at Páll á Reynatúgvu sum fíggjarnevndarlimur undir fíggjarlógarviðgerðini kroysti fíggjarnevndina til at seta 500 túsund av til Listaskúla á Sandoynni, hóast politiskur vilji ikki var fyri hesum ófyrireikaða uppskoti. Einum uppskoti, har greiða ikki hevur verið á, um talan er um listaskúla, tónleikaskúla, ítróttarskúla ella okkurt heilt annað.

Samstundis hevði hesin sami tingmaður Tjóðveldisfloksins virknan leiklut í at skera játtanina til Musikskúlan so mikið, at skúlin nú ikki er førur fyri at veita nøktandi frálæru, fær hann ikki tær 450 túsund krónurnar, sum í resta.

**Ein varði ella ein ítróttarhøll**

Leingi hevur verið kunnugt, at sandoyggjafólk ynskja sær eina ítróttar- og samkomuhøll, fyri at økja um trivnaðin í oynni. Ein slík høll hevði eisini verið nakað, sum sandoyggjafólk høvdu fingið gleði av at brúkt sum savnandi miðdepil á nøkrum økjum innan mentanarlívið. Ein ófyrireikaður varði av einum einstøkum tingmanni í skapi sum ein skúli av einum ella øðrum slag, hevði ikki á sama hátt verið til gagns fyri Sandoyggjafólk, men heldur fyri nøkur fá aðrastaðni úr landinum.

Ítróttarhøllini hava sandoyggjafólk arbeitt fyri. Og tí hava tey eisini fingið skrivliga tilsøgn úr Mentamálaráðnum um ein stuðul uppá 45 prosent av kostnaðinum av eini ítróttarhøll. Mentamálaráðið hevur skrivliga boðað frá hesum.

Tað er heilt greitt, at Sandoyggin ikki er javnt sett við aðrar partar av landinum á fleiri økjum. Eisini, tá talan er um at útvega ein hentleika sum ítróttar- og samkomuhøll. Tí haldi eg tað vera rætt, at almennu Føroyar stuðla einum slíkum tiltaki. Og tað vil eg eisini fegin vera við til.

Harmist stórliga um, at tjóðveldistingmaðurin og fíggjarnevndarlimurin, Páll á Reynatúgvu, ikki vil sýna so mikið av landspolitiskum skynsemi, at hann kann bjarga gangliga landsumfatandi musikskúlanum, men heldur vil byggja lokalpolitiskan varða av sær sjálvum í skapi, sum ein ófyrireikaður Listaskúli ella Tónleikaskúli ella Ítróttarskúli ella kanska okkurt heilt heilt annað.

Ein væl virkandi musikskúli er sanniliga eisini til gangs fyri Sandoynna.

**Vit vilja Sandoynni væl**

Havi lisið aftursvarið frá bæði Páll á Reynatúgvu og flokstrúgva skilamanninum, Sólvit Simonsen. Báðir leggja meg undir at leggja fótonglar fyri menningarætlanum í útjaðaranum og at taka pening frá útjaðaranum. Tí vil eg beinanvegin vísa aftur. Skal til eina og hvørja tíð stuðla skilagóðum og fyrireikaðum ætlanum á Sandoynni og aðrastaðni í útjaðaranum. Men haldi tað ikki vera skilagott at leypa á leistum fyri ófyrireikaðum ætlanum hjá Páll á Reynatúgvu og lata grundleggjandi ungdómsarbeiði, sum tann landsumfevnandi musikskúlan bløða afturfyri. Tì orkestrinum spæli eg ikki við í.

# Herðaklapp til G-fólkini

**Aldri áður havi eg verið til eitt so væl skipað og innihaldsríkt uttandura-tiltak í Føroyum, sum G-festivalurin seinasta vikuskifti. Fyrireikararnir av G-festivalinum hava uppiborið eitt stórt herðaklapp, fyri at stíga nýggj og spennandi fet fyri føroyskum mentanarlívi**

**John Johannessen**
*tinglimur fyri Javnaðarflokkin*
*framsøgumaður í mentanarmálum*
*www.jokarin.com*

Ein ótrúlig uppliving. Dugi í skrivandi stund ikki at finna onnur orð fyri vitjanini á G-festivalinum um vikuskiftið. Ein fjølbroyttur og væl skipaður festivalur fyri allar aldursbólkar, har tú fekst høvi at njóta vakra tónleikin hjá umleið 30 tónleikabólkum. Bæði góðum lokalum tónleikarum, sum Anniku Hoydal, I Am, Gestum, Eivør Pálsdóttir og fleiri. Og síðani heimskendum tónleikarum, sum Kashmir, Russ Taff og Lisu Ekdahl.

"Vit eru so lítil. Vit kunnu ikki í Føroyum." Tað er vanliga svarið, ið virkin og víðskygd fólk fáa her heima, tá tey seta sær nakað stórt fyri. Fáa aðrastaðni hevur Jantelógin so nógv at siga, sum í Føroyum. Men tíbetur løgdu G-fólkini líka í hesa fordómsfullu lóg. Hóast andróður á vegnum, so hildu tey kortini á og prógvaðu, at tað ber til. Úrslitið gjørdist eitt tað innihaldsríkasta og best skipaða uttandura mentanartiltak, ið hildið er í Føroyum seinastu árini.

Veit ikki, um nakar hevur ilskast um, at tað kostaði knappar 400 krónur at vitja á festivalinum í ein dag. Men haldi ikki, at hetta er nakað at ilskast um. Tí fáa aðrastaðni ber til at vera til ein so stóra konsert við so nógvum kendum nøvnum fyri so lítlan pening. Tað vita øll, sum onkuntíð hava verið til líknandi tiltøk í ørðrum londum.

Nú vit tosa um onnur lond, haldi eg, at tað eisini er vert at viðmerkja, at G-festivalurin ikki á nakran hátt stóð aftan fyri líknandi tiltøk í grannalondum okkara.

G-fólkini hava brotið upp úr nýggjum innan føroyskt mentanarlív. Tey hava skapt føroyska festival mentan. G-festivalurin eigur at vera komin fyri at verða. Og vónandi fara allar góðar kreftir - eisini almennar - at stuðla gróthørðu kreftunum í Gøtu framhaldandi at kynda undir henda nýggja táttin innan føroyskt mentanarlív.

Túsund takk fyri eina framúrskarandi og hjartanemandi uppliving.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

# Silkivegurin er vorðin heroinvegur

**Fyri fleiri hundrað árum síðani var Silkivegurin nøttur til at flyta silki og krydd-urtir úr Asia til Evropa. Í dag verður vegurin nøttur til at flyta rúsevnið heroin. Fyrr gav flutningurin eftir Silkivegnum framburð og trivnað í Evropa. Í dag er farmurin oyðandi**



RÚSEVNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í nútiárunum var blóðugt borgarakríggj í gamla sovjetlððveldinum Tadjikistan, og búskapurin varð lagdur í oyði. Í dag er landið eitt av teimum fátækastu í heiminum. Nøkur forvinna sær til lívsins uppihald við at dyrka bummull, meðan onnur hava kent seg noydd at fáa inntøkuna burtur úr einum øðrum hvítum evni, heroini.

Stutt frá ánni Pjardzi standa fleiri hundrað tadjikiskir vaktarmenn og eygleiða tað oydna lendið hinumegin tað afghanska markið, tí haðani koma umleið 80 prosent av øllinum heroininum í heiminum. Fyri nøkrum vikum síðani lógu vaktarmenninir og bíðaðu ímillum runnarnar. Teir høvdu fingið at vita, at ein størri nøgd av heroini var á veg ímóti markinum. Stutt fyri midnátt tað eina kvøldið kom ein bláur bilur eftir tí vánaliga vegnum. Tveir menn vóru í bilinum, men teir mundu óra ilt, tí brádliga vendu teir. Teir tadjikisku vaktarmenninir lótu fleiri skot av eftir bilinum, sum endaði í einari grøv.

Tað vísti seg, at smuglararnir høvdu 50 kilo av heroini í bilinum.Í vesturlendskum oyrum ljóðar tað næstan ótrúligt, men hjá teimum tadjikisku vaktarmonnunum var fongurin ikki størri, enn teir eru vanir við.

### Taliban-stðrið

Í Sovjet-tíðini var tað 1.400 kilometrar langa markið ímillum Tadjikistan og Afghanistan stongt. Í dag er er øvugt, og opium og heroin í stórum nøgdum verður flutt um markið, haðani tað fer til Russlands og Vesturevropa. Hendan smuglaraleiðin hevur fingið navnið Silkivegurin eftir teirri gomlu leiðini, sum fyrr bleiv nýtt til at flyta krydd-urtir og silki til Vesturheimin.

Fyrr vórðu opium og heroin úr Afghanistan flutt ígjøgnum Iran, Turkaland og Balkan-londini til Vesturevropa, men sambært ST er tann nðggi Silkivegurin vorðin tann mest nýtta heroin-smuglaraleiðin ímillum Afghanistan og Evropa.

Teir tadjikisku myndugleikarnir viðganga, at tað er ikki lætt at forða flutninginum. Í 1999 framleiddi Afghanistan næstan 80 prosent av øllum heroininum í heiminum, og næstan 90 prosent av heroininum, sum bleiv selt í Vesturevropa, kom haðani. Árið eftir bannaði Talibanstðrið afghanum at dyrka opium, og bannið vísti seg at virka sera væl. Í 1999 dyrkaðu teir afghansku bøndurnir umleið 4.600 tons av ráopium, men framleiðslan minkaði niður í 200 tons, eftir at bannið var komið í gildi.

### USA torir ikki

Men tá amerikanararnir og aðrir róku Taliban-stðrið frá, fóru teir afghansku bøndurnir aftur at dyrka opium, og sambært ST fer heystið at seta met í ár. Stjórnin í Kabul hevur sett bøndrunum forboð fyri at dyrka opium og at gera heroin. Men boðini frá stjórnini hava onga ávirkan, tí stjórnin hevur bara ræðið í sjálvum høvuðsstaðnum, og lokalir krígsharrar forvinna nógvar pengar burtur úr heroinsmuglingini. Teir hava tí ongan áhuga í at hjálpa stjórnini.

Í Tadjikistan vilja myndugleikarnir vera við, at afghanar hava minst 400 rannsóknarstovur, sum gera heroin, og 80 teirra eru á leiðini við tadjikiska markið. Tadjikar halda, at Vesturheimurin má taka sær um reiggj.

– Rúsevnissmuglingin úr Afghanistan er tann størsta inntøkukeldan hjá altjóða yvirgangi, sigur heryvirmaðurin Avaz Juldasjov, sum er leiðari hjá teimum tadjikisku vaktarmonnunum við afghanska markið. Hann vísir á, at altjóða serfrøðingar gita, at samband møguliga er ímillum teir afghansku rúsevnabarónarnar og yvirgansgmenn, men tað er ikki neyðugt at gita, sigur hann. Tí tað er so.

– USA kundi sent sínar hermenn higar at steðga virkseminum, men sannleikin er, at teir tora ikki. Tann afghanski búskapurin liggur í sori, og teir hava einans heroinið at liva av. Tekur USA hesa inntøkuna frá teimum, kemur eldur í Afghanistan, sigur Avaz Juldasjov.

Higartil í ár hava teir tadjikisku myndugleikarnir lagt hald á góð fýra tons av heroini úr Afghanistan, og teir rokna við, at nøgdin verður væl størri, tá árið endar. Men tølini geva samstundis eina greiða ábending av, hvat er hent í Afghanistan. Tá Talibanstýrið ráddi fyri borgum, komu bara nøkur fá kilo um markið. Tey serkønu halda, at í fjør útfluttu teir afghansku smuglararnir umleið 120 tons av heroini ígjøgnum Tadjikistan.

### Stórar avleiðingar

Einum nýtist ikki at leita leingi í Miðasia fyri at finna avleiðingarnar av heroinflutninginum úr Afghanistan. Í grannalondunum Iran og Pakistan eru fleiri milliónir misnýtarar. Eingin veit, hvussu nógvir misnðtararnir eru í teimum gomlu Sovjetlýðveldunum, men summi halda, at har eru minst 300.000.

– Í Sovjettíðini høvdu vit ongar rúsevnamisnýtarar í Tadjikistan, men í dag ber til at keypa heroin á gøtuni. Tølini vísa, at vit fáa fleiri og fleiri misnýtarar, og eyðkvæmið er eisini farið at breiða seg, sigur Tozjburi Khotamuri, sum stendur á odda fyri einum stovni, sum hjálpir illa komnum kvinnum í Tadjikistan.

Hon sigur, at kvinnurnar tora ikki at siga øðrum, at menninir eru misnýtarar. Í Tadjikistan er tað maðurin, sum ræður í heiminum, og hann hevur altíð rætt. Tí verður tað dult sum mansmorð, at maðurin er misnýtari. Hetta endar ofta við harðskapi og øðrum, og so við og við fer heimið í upployssn.

### Vinningurin dregur

Russar royna at verja seg ímóti heroinflutninginum. Fleiri túsund russiskir hermenn eru á varðhaldi við tað afghanska markið, men næsta ár fara teir haðani. Tá skal løgreglan taka við eftirlitinum. Tey, sum royna at tálma flutninginum, siga hetta vera eitt afturstig, men russar hava svarað, at tað ger tað sama, hvussu nógvar hermenn ella løgreglumenn teir hava við markið, tí rúsevnið kemur fram kortini.

Sannleikin er eisini, at vaktarhaldið við afghanska markið er ikki serliga gott. Ætlar tú tær um markið við eitt sindur av heroini, sleppur tú ígøngum við at rinda einar 100 amerikanskar dollarar.

Tað eru eisini teir fægstu smuglararnir, sum verða tiknir, og vinningurin er øðiligur. Í Afghanistan kunnu smuglararnir keypa eitt kilo av heroini fyri einar 2500 krónur, men tá vøran kemur á gøturnar í Moskva ella Vesturevropa, er prísurin 500-faldaður. So tað er einki at siga til, at teir afghansku bøndurnir velja at dyrka opium, og at smuglararnir seta lívið í váða fyri at fáa tað av landinum til misnýtararnar í Russlandi og Vesturevropa.

*(Kelda: Aftenposten)*


Til Sølu

MITSUBISHI PAJERO 3.5 V6



• Aut. gear • Aircondition og nógva aðra útgerð • Bert km 54.000
• Árg okt 98 • Bilurin er í sera góðum standi og væl røktur

Fígging kann útvegast

Nógv onnur góð tilboð
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
sí meira á www.bilfridkan.fo · landsins lagaligasta brúktbilafígging

Sosialurin 341800

Til Sølu

KIA SEPHIA 1.5



• Km 98.600 • Árg. apr 98 • Bilurin er í sera góðum standi og væl røktur

Kr. 65.000,- Útgjald bert kr. 14.000,- restina práta vit um

Nógv onnur góð tilboð
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
sí meira á www.bilfridkan.fo · landsins lagaligasta brúktbilafígging

Sosialurin 341800

SUNNUDAGSDØGURÐI Á HOTEL NORÐ

Sunnudagin 25. juli er matarskráin hendan:

Forrættur:
Rómaligerað asparges suppa v/flutes

Høvuðsrættur:
Heilstokt oksafilet v/bátaeplum og hvítum eplum, grønsaks sauté, grønmeti og sherrysós

Dessert:
Stór kakubuffet við kaffi, er at fáa allan sunnudagin

Ring og bílegg borð á tel 45 12 44

Sosialurin 341800

